

Hilmar Augustinussen

# Eg spyrji bara!

Fyri nøkrum árum síðani skrivaði eg eina grein undir hesi yvirskrift. Haldi at eg fari at nýta hana aftur, kanska nakrar ferðir. Ein hevur jú altíð loyvið at spyrja, ella?

Nú øll skrivingin v.m. hevur verið um Jenus av Rana og hansara »fornermilsi« av íslendska forsetisráðharranum og hennara samliva, loyvi eg mær at koma við hesum íkastinum og einum spurningi til tykkum, sum takað undir við hesum kalda og kyniska stemmu »fiskara«, JaR.

Tað sum fyrst fall mær í huga, tá ið eg læs samrøðuna við JaR í Vágaportalinum, var eitt sitat av Martin Niemöller. Martin Niemöller var týskur theologur og prestur, og so var hann samførdur antikommunist. Hann tók fult undir við Hitler og nazistunum, tá teir tóku valdið í Týskalandi í 1933. Men í 1937 varð hann tó sjálvur settur fastur, tí hann vildi ikki góðtaka, at staturin tók valdið á kirkjuni.

Niemöller yvurlivdi uppihaldið í KZ-leguni og bleiv eftir kríggið mest kendur sum fyrilestrahaldari. Eitt tað kendast sitatið úr hansara fyrilestrum, var tað sum kom mær til hugs, tá ið eg læs um JaR og hannsara skansgerð, og havi eg loyvt mær at umseta hetta:

**»Fyrst tóku teir kommunistarnar**
**men eg segði onki, tí eg var ikki kommunistur**

**So tóku teir fakfelagsfólkið**
**men eg segði onki, tí eg var ikki fakfelagsfólk**

**So tóku teir jødarnar**
**men eg segði onki, tí eg var ikki jødi**

**So komu teir eftir mær**
**men tá var ongin eftir at tala at.«**

»Eg spyrji bara«.

Er hetta gongdin vit ynskja fyri Føroya Land? Skal onki verða loyvt, um tað ikki er OK sambært JaR'sa útlegging av Svørtubók. Hvat verður tað næsta, ið ikki hugar JaR

Hvar er tolsemið, eg eri stórliga bangin fyri tí!



Halla Samuelsen
*forkvinna í sosialu nevnd*

# Nýggj tilboð til Boðanesheimið

Nú nýggj tilboð frá Articon, MT højgaard og J & K Petersen komu inn 1. September 2010 til Boðanesheimið, fer bygginevndin at gjøgnumganga og døma innkomnu tilboðini. Væntandi verða vit liðug við hetta síðst í september. Tá hetta arbeiðið er liðugt í bygginevndini fer tað í Sosialunevnd, Fíggjarnevndina og síðan í Býráðið.

Tað var soleiðis, at tey fyrru tilboðini høvdu grundleggjandi manglar í mun til byggiskránna og mynduleikakrøv og tá mælti ein meiriluti í bygginevndini til:

Meirilutin í bygginevndini hjá Tórshavnar kommunu mælti herfyri frá at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum at byggja ellis- og røktarheim Yviri við Strond, tí øll teirra hava grundleggjandi manglar í mun til byggiskránna og myndugleikakrøv, sum gera, at tað er ikki ráðiligt at realisera nakað av uppskotunum á fyriliggjandi grundarlagi.

Síðst í juni mánaði segði eg í grein í fjølmiðlunum, at spakin vónandi verður settur í í november í ár. Eg eri so mikið bjartskygd, at sjálvt um vit nú blivu nakað seinka, trúgvi eg at vit seta spakan í í november ella december í ár.


